3. mars 2026

P/F Føroya Banki
Att: Stjórnarskrivstovan
Oknarvegur 5, Postboks 3048
FO-110 Tórshavn

**Uppskot til støðutakan á ársaðalfundi í P/F Føroya Banka hin 26. mars 2026**

P/F Føroya Banki hevur boðað frá, at nevnd bankans á ársaðalfundi bankans hin 26. mars 2026 ynskir at leggja fram uppskot til broytingar í viðtøkum bankans.

Til tess at uppskot nevndarinnar um viðtøkubroytingar kunnu samtykkjast á aðalfundinum uttan at taka atlit til kravið um viðtøkuførið sambært grein 9.2 í viðtøkum bankans um at í minsta lagi 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum, setur Føroya Landsstýri hervið, við tilvísing til grein 9.3. í viðtøkum bankans, fram soljóðandi uppskot til støðutakan á ársaðalfundi hjá P/F Føroya Banka hin 26. mars 2026:

*"Føroya Landsstýri skjýtur upp at vikið verður frá kravinum um viðtøkuføri sambært grein 9.2 í viðtøkum bankans, í sambandi við at ársaðalfundurin viðgerð uppskot nevndarinnar um at tillaga verandi orðingar í grein 6.2. í viðtøkum bankans (uppskot nevndarinnar 6b).*

**Føroya Landsstýri**